# Russar drekka ov illa




Rúsdrekkanin í Russlandi er komið so langt út um mark, at menn nú eru farnir at fylla seg við barberspritti og øðrum. Bretska blaðið Lancet hevur kannað málið, og tað vísur seg, at helvtin av teimum doyggjandi monnunum í arbeiðsførum aldri doyggja av drukk. Hetta speglast aftur tá ið hugt verður eftir miðal livialdrinum. Menn í Russlandi liva í miðal 59 ár, meðan livialdurin hjá kvinnum í Russlandi er 72 ár.

# Krevur ursmið í fongsul

Fyrr í ár valdi ursmiðurin í Keypmannahavn, Michael Woolhead, at verja seg við vápni, tá ið hann og handil hansara vórðu álopin av tveimum serbum. Ákærin í málinum krevur nú ursmiðin handan rimar í tvey ár. Skuldi dómurin hjá ursmiðinum fallið á tvey ár, er tað eins revsuvert at ræna ein urhandil, sum at verja seg við vápni. Michael Woolhead stendur við sítt, og sigur, at hann bara mátti verja seg fyri røvarunum, sum eru 26 og 25 ára gamlir.

# mleiðslu



*Við 700 fermetrum verður Bakkafrost útbygt og fær eina portiónslinju aftrat. Við út- og umbyggingini verður framleiðsluorkan tvífaldað*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Rationalisering

Fyri út-og umbyggingina á Bakkafrost eru fløkini reinskorin við hond, sum vanligt hevur verið í fiskaframleiðslu í mong ár, men hetta verður søga, tá virkið letur uppaftur fyrst í august.

– Nú verður øll reinskering maskinell, og við hesi linjuni, sum vit fáa aftrat og teirri tøkni, sum nú er á marknaðinum, verður framleiðsluorkan tvífaltað, sigur Regin.

Tað er RTS við Svend Lamhauge, sum hevur gjørt jørðarbeiði og Henning Hansen, byggimeistari, sum ger timburarbeiði.

John Mikkelsen stendur fyri el-arbeiðnum.

– Í sambandi við, at framleiðslan verður rationaliserað og økt, hava vit eisini fleiri útlendskar veitarar við útgerð, sum eru inni í myndini í løtuni, sigur Regin.

Bakkafrost Holding er høvuðsfelag, sum hevur fýra dóttirfeløg undir sær. Tey fýra feløgini eru Faroe Salmon, sum hevur alla sjógvalingina undir hond, kryvjivirkið í Klaksvík, Faroe Salmon Processing og Bakkafrost, sum er sølufelagið.

– Øll framleiðslan verður seld undir navninum Bakkafrost. Vit hava framleitt portiónir seinastu 10-11 árini, og tí er felagið eitt kent navn á útlendska laksamarknaðinum.

### Lækkandi prísir

Regin Jacobsen vísir á, at prísirnir á helium laksi, sum seldur verður her og nú, sum hann tekur til, hevur verið fallandi hvørja viku í longri tíð.

– Orsøkin er, at norðmenn hava sent nógv størri nøgdir av laksi á marknaðin, enn teir vanliga plaga hesa tíðina av árinum.

Stjórin vísir á, at portiónirnar, sum Bakkafrost framleiðir, verða handlaðar í sáttmálum yvir hálvt ár ella so, og tí hevur felagið ikki merkt hesar somu lækkingar á sama hátt, sum teir, ið útflyta heilan fisk.

Hann væntar tó, at prísirnir á portiónum fara at lækka nakað, tá ið sáttmálarnir verða endurnýggjaðir.

– Vanliga eru prísirnir fyri portónir meira støðugir enn prísirnir fyri heilan fisk. Prísirnir eru ongantíð so høgir – og ongantíð so lágir, sum tann fiskur, sum verður seldur her og nú.

Regin sigur, at portiónirnar hava verið lutfalsliga støðugar í prísi øll árini.

### 160 fólk

– Tá framleiðslan av laksi í Føroyum var ov lítil til, at vit kundu hava støðugt arbeiði á virkinum, keyptu vit ísaðan laks úr Noregi og partvís úr Íslandi.

Stjórin hevur ikki hug at seta tal á, hvat um- og útbyggingin kostar.

- Men hetta er ein stór íløga, sum vit halda er neyðug og skilagóð, sigur Regin Jacobsen.

Tilsamans 160 fólk arbeiða hjá Bakkafrost Holding og hjá dóttirfeløgunum, sum eru undir hattinum hjá móðirfelagnum.

# Eysturoyingar keypt Drós



*Fyrrverandi og núverandi eigarar av Perfumarí Drós í Bøgøtu, Eivind Jacobsen, Kristbjørg Poulsen og Jens Mortan Rasmussen*

**Eystursíðan á Skálafjørðinum blandar seg meira uppí handilslívið í Havn, nú Eivind Jacobsen á Strondum og Jens Mortan Rasmussen á Skála hava keypt Drós, sum er eitt gamalt navn í miðbýnum**

HANDIL

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Handilin Perfumarí Drós í Havn hevur fingið nýggjar eigarar. Tað er Kristbjørg Poulsen, sum hevur drivið handilin seinastu fýra árini.

Nýggjur eigari er Sp/f Drós og teir, sum eiga felagið, eru Eivind Jacobsen á Strondum og Jens Mortan Rasmussen á Skála. Teir eru báðir kendir sum dugnaligir handilsmenn.

Stjóri í Sp/f Drós er Eivind Jacobsen.

### Í miðbýnum

Drós er eftirhondini eitt gamalt navn í miðbýnum í Havn, har handilin liggur í Bøgøtu 15.

Handilin selir perfumu, undirklæði og nakað av smúkkum og ymiskum smúkkutilhoyri.

Nýggju eigararnir siga, at handilin hevur gingið væl, og nú hann varð lýstur til sølu, gjørdu teir av at keypa.

### Sama fólk

Eivind Jacobsen og Jens Mortan Rasmussen siga, at somu fólk, sum arbeiða í handlinum í dag, fara at halda fram, men nú Kristbjørg Poulsen gevst og fer í starv hjá manninum, Valbjørni Dalsgarð, verður okkurt nýtt andlit at síggja millum starvsfólkini.